Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting: 25. sept. 2023
Mál nr.: 23/18110-6
Málsviðgjørt: HP

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 63 frá 15. mai 2012 um arbeiðsfremjandi tiltøk, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, verða gjørdar hesar broytingar:
§ 13. Lesandi í útbúgvingaraldri fær ikki stuðul sbrt. § 12 til: 1) framhaldsdeild fólkaskúlans, tá tann lesandi ikki hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, og er undir 18 ár, 2) miðnámsútbúgving, tá tann lesandi ikki hevur forsyrgjaraskyldu mótvegis barni, og er undir 22 ár, 3) førleikagevandi útbúgving, tá tann lesandi er undir 25 ár. *Stk. 2.* Tá talan er um persónar, sum hava umfatandi arbeiðstarn og djúptøknar persónligar og sosialar trupulleikar, kann víkjast frá treyt sbrt. stk. 1.	**1.** Í § 13, stk. 1 verður aftan á "§ 12" sett: "ella § 13 a". **2.** § 13, stk. 2 verður strikað.
	§ 2

	Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024. *Stk. 2.* Persónur, sum fær stuðulsveiting sbrt. § 12 ella 13 a, áðrenn henda løgtingslóg fær gildi, fær stuðulsveiting eftir higartil galdandi reglum.